

# Tú kanst vera við til at avgera vinnaran

Fyri at atkvøða send eini sms boð til 1930, við kotuni, ið stendur aftan fyri tað navnið, ið tú vilt atkvøða fyri. Hvørt sms kostar 5 kr., og tú hevur loyvi at atkvøða einaferð fyri hvørja planet. Øll føroysk fartelefonhald bæði hjá Føroya Tele og hjá Vodafone kunnu luttaka.
Tey, ið eru við í atkvøðugreiðsluni taka samstundis lut í lutakasti um fleiri góðar vinningar:

## Tilnevning besti føroyski bólkur ella einstaklingur




### The Dreams

The Dreams er ein bólkur, ið altíð hevur megnað at ganga óvæntaðar leiðir, tá bólkurin í 2005 reis upp úr øskuni av punkbólkinum Zink, var tað við boðunum til Føroya fólk, at Anastacia, hevði valt bólkin at luttaka í hennara sending á MTV.

Komnir heim aftur við einum triðja plássi í lummanum, fóru teir í upptøkuhølið, og spældu sínar tulkingar av føroyska sangskattinum inn. Ein fløga, ið var óvæntað, men sum gjørdi The Dreams til best umtókta tónleikanavnið í Føroyum.

Fluttir til Danmarkar fóru teir í eitt óvæntað samstarv við gamla hip hopparan Chief 1. Síðan valdu teir at luttaka í Eurovision grand prixnum, ein luttøkam sum eisini kom óvart á fólk, og so sungu teir á donskum. Men eins og øll hini valini riggaði hetta. Hetta riggaði somikið væl, at bólkurin hevur havt trý løg ovast á Boogie-listanum hjá DR, m.a. Backstabber, ið enn liggur har. Eingin annar føroyingur hevur nakrantíð havt so nógv løg á Boogie-listanum.




### Høgni Lisberg

Tað hevur verið rættiliga stilt rundan um tónleikaran Høgna Lisberg stóran part av hesum árinum. Hetta er tó ikki tí hann ikki hevur verið virkin. Høgni hevur saman við framleiðaranum James Thomas arbeitt við fløguni "Haré Haré", ið kom út ein av seinastu døgunum í november. Henda fløga er somikið góð, at hon kastar Høgna beint inn millum uppskotini til ársins tónleikanavn. Fløgan vísir ein nógv búnaðan Høgna. Tann lovandi tónasmiðurin við góðum oyra fyri fangandi løgum, hevur funnið sítt egna útrykk, og hevur lært at brúka røddina, ið nú telist millum tær heilt góðu í Føroyum. Undir nýggjum og meira enskt klingandi kunstnaranavni, Hogni, hevur Høgni enn sum áður eyguni vend móti stóru marknaðunum kring okkum. Við nýggju fløguni eru stórir møguleikar fyri, at dreymurin um altjóða gjøgnumbrotið verður veruleiki.




### Lizzie

Lizzie gav í februar fyrstu fløgu sína út, og hevur síðan tá gingið sigursgongd á donsku hittlistunum. Stakfløgan "Ramt i Natten" er eitt gott boð uppá ársins hitt í Danmark. Longu, áðrenn sjálv fløgan kom út, hevði fyrsta stakfløgan selt til platin í Danmark. 25 ára gamla føroyska songkvinnan selur enn nóg nógvar fløgur, til at gera seg galdandi á donsku sølulistunum, ja tað hevur hon gjørt alt árið. Ummælini av fløguni hava verið so sum so, men tað kemst ikki uttanum, at Lizzie hevur rakt danska popp áskoðaran serstakliga væl. Hetta kemst ikki minst av, at Lizzie á fløguni samstarvar við danska framleiðaraparið Madness 4 Real, ið teljast millum bestu poppsmiðir í Danmark.




### Orka

Hjá Orku gongur tað at bróta upp úr nýggjum hond í hond við lurtaravinarligheit. Orka hevur funnið okkurt heilt serligt, og hevur við sínum orkufullu framførslum rúnarbundi lurtarar úti sum heima. Júst afturumfarna konsertferðin endaði á Transmusicales festivalinum í Rennes í Fraklandi, har Orka var húsorkestur, og fekk frálíka umrøðu í nógvum fronskum og bretskum miðlum. Umframt tilboð um, at spæla á Noise of Art festivalinum í Royal Festival Hall í London.

Bólkurin spælir á ymiskt úr einum fjósi á Strondum, og skapar okkurt sum nokk best kann lýsast sum ordiliga fangandi fólkatónleik við einum nýskapandi industrial ljóði. Orka telist heilt víst millum bestu føroysku tónleikanøvnini í løtuni.




### Týr

Týr hevur havt eitt serstakliga gott ár. Á fleiri stórum konsertferðum hevur Týr ferðast kring Evropa og Norður Amerika, og spælt tilsamans 100 konsertir. Týr hevur staðfest sína støðu, sum eitt tað best umtókta tónleikanavnið innan fyri Viking Metal. Teir hava rakt ein rættiliga smalan málbólk, men hava rakt hann somikið væl, at fólk kring allan heimin hevur tikið Týr og sostatt eisini føroyska kvæðamentan til sín. Í 2008 hevur Týr somuleiðis leita sær heim aftur, og vit hava uppliva hendan bólkin á konsertum í Føroyum. Tað er gleðiligt at síggja, at teir taka sær tíð til hetta.

Fløgan Land kom út í ár, og fekk her heima sera jaliga umrøðu frá ummælarum, hon er við til at halda støðuna hjá Týr, sum Føroya best seljandi bólk.